TVØROYRAR SKÚLI

# Foreldrasáttmáli um skermfrían barndóm

**Endamál:**

Vit, foreldur í ___ flokki í Tvøroyrar skúla, gera hesa felags avtalu, tí vit ynskja at geva børnum okkara ein tryggan og sunnan uppvøkstur – uttan trýst og órógv frá snildtelefonum og sosialum miðlum.

Vit ynskja, at børnini fáa tíð og frið til spæl, vinaløg og verulig sambond – áðrenn tey fáa atgongd til snildtelefon.

**Grundgevingar fyri at bíða við snildtelefon:**

- Sosial menning:
  - Børn læra at vera saman við øðrum við at samskifta andlit til andlits, heldur enn gjøgnum ein skerm.
  - Børn læra empati, samstarv, avlesa andlitsbrøgd og kropsmál, tolsemi, at loysa konfliktir við at vera saman við øðrum - uttan skerm.
- Friður fyri børnini:
  - Børn fáa meira tíð til spæl, rørslu, skapandi virksemi og at hvíla seg – uttan støðugt at verða avbrotin av notifikatiónum og tí, sum hendir á skíggjanum.
- Trygd og ábyrgd:
  - Kanning hjá Red barnet (2024) vísir, at 3. hvørt barn millum 9 og 14 ár hevur uppliva talgildan ágang[1] á netinum.
  - Við at bíða, geva vit børnum møguleika at gerast meira búgvin og tilvitað, áðrenn tey fáa atgongd til internet og sosialar miðlar.

---

[1] Talgildur ágangur er heiti, ið fevnir um eitt breitt økið av ágangandi atburði á  netinum. Tað kann vera at verða tosað ljótt til, at vera noyddur/kroystur til eitt hvørt, so sum at senda ella fáa óhóskandi myndir, uttan at hava biðið um tær (Børn og unges erfaringer med digitale krænkelser og andre ubehagelige oplevelser online 2024).

- Fyribyrgja happing á netinum:
    - Happing við snildtelefonum kann fara fram á ymiskan hátt og á ein hátt, sum ikki altíð kann vísast aftur á.
    - Børn kunnu vera hildin uttanfyri.
    - Falskir vangar/dulnevnd happing.
    - Happing kann vera alt døgnið (ikki bert teir tímarnir barnið er í skúla t.d.).
    - Onki eftirlit av vaksnum.
    - Í Barnaverkætlanini, har 750 børn og ung í Føroyum vórðu spurd, kom fram, at børn/ung kenna seg ótrygg á netinum, og at tey uppliva, at happing á netinum er ein stórur trupulleiki.[2]
- Minka um trýst og samanbering:
    - Snildtelefonir og sosialir miðlar kunnu skapa trýst, samanbering við onnur og kenslu av at "skula passa inn" og vera á ein ávísan hátt.
- Felagsskapur millum foreldur:
    - Tá vit standa saman sum foreldur, minkar sosiala trýstið – bæði á børn og foreldur – um at "øll hini hava longu eina snildtelefon".

[2] fragreiding-har-boern-og-ung-trivast-roeddir-visjonir-og-vonir_fo_30-06-2025.pdf

TVØROYRAR SKÚLI

## Vit lova og avtala at:

- Okkara børn hava ikki snildtelefon (smartphone), fyrrenn tey eru fylt 15 ár.
    - Tey kunnu fáa ringi-ur ella knappatelefon
- Halda saman um hesa avgerð og tosa opið við børnini um, hví vit hava avgjørt hetta.
- Stuðla hvør øðrum sum foreldur, um trýst, ivamál ella spurningar stinga seg upp.
- Endurskoða avtaluna á felags foreldrafundi í byrjanini av hvørjum skúlaárið, ella um serlig viðurskifti gera tað neyðugt

1. ______________________________
2. ______________________________
3. ______________________________
4. ______________________________
5. ______________________________
6. ______________________________
7. ______________________________
8. ______________________________
9. ______________________________
10. ______________________________
11. ______________________________
12. ______________________________
13. ______________________________
14. ______________________________
15. ______________________________
16. ______________________________
17. ______________________________
18. ______________________________
19. ______________________________
20. ______________________________
21. ______________________________
22. ______________________________
23. ______________________________
24. ______________________________
25. ______________________________
26. ______________________________